VALGREINAR

8 min. frá Toftum til Tórshavnar í 2012

Dánial Petur Hansen
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Fasta sambandi millum Skálafjørðin og Havnina skal á politisku dagsskránna.

Fyrst hevur verið fram, at Sandoyartunnilin er tann næsti undirsjóvartunnilin eftir Norðoyatunnilin.

Undirsjóartunnilin millum Havnina og Skálafjørðin, har Strendur eisini er knýtt uppí, eigur at verða bygdur áðrenn.

At tað bert tekur 8 min frá Toftum til Tórshavn í 2012 er ein realistiskur møguleiki.

Longu nú eigur at verða byrja uppá at fáa klárlagt ymisk viðurskifti í hesum sambandi. Serliga neyðugar broytingar í samferðsluviðurskiftunum er neyðugt at fáa hugt uppá í góðari tíð. Vit eiga at læru at roundunum hjá eitt nú Leirvíkingum, og heldur byrja uppá hesa avbjóðing í góðari tíð.

Ein nýggj og virkin byrjan við Sjálvstýrisflokkinum er tann gongda leiðin. Gott val!

Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri: Tryggleika – Framburði – Vælferð

Haldóra Ranghamar
valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Við einum nýskipanaruppskoti vil sambandsflokkurin innan ríkisfelagsskapin dagføra okkara heimastýrisskipan.

Somuleiðis vil sambandsflokkurin arbeiða fram ímóti einum sjálvberandi búskapi.

Fyri at skapa framburð, ein sjálvberandi búskap, krevst at vit hava eitt fjøltáttað og vælvirkandi vinnulív, sum kann geva størst møguligt útbýti.

Tí er umráðandi, at vit heilt frá fólkaskúlanum tryggja góðar og tíðarhóskandi umstøður at virka undir og somuleiðis at okkara miðnámsskúli, aðrar útbúgvingar, eins og gransking verða dagført og stuðlað, so tað kann virka við til at menna okkara vinnulív til at gerðast kappingarført. Og harvið skapa okkum búðskaparvøkstur í samfelaginum.

Búskaparvøkstur er grundarlagi fyri einum vælferðasamfelagi, sum skal kunna veita hvørjum einstøkum borgara tryggar og góðar liviumstøður í tí dagliga, her hugsaði eg um familjuna, tey gomlu og tey veiku í samfelaginum.

Tí er umráðandi at velja sambandsflokkin fyri at varveita: Tryggleikan - Framburð - Vælferð.

Miðflokkurin er í dag »einasti flokkur«…

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

…ið hevur tað greiðastu støðuna til eitt Føroyskt TJÓÐARFRÆLSI (fullveldi).

Harmuligt er at síggja føroysku fjølmiðlarnar siga, at Miðflokkurin ikki ger nógv við Tjóðarfrælsisspurningin til vali 2004 (hygg bara hvat stendur í valskrá okkara).

MIÐFLOKKURIN er, sum tann "einasti flokkurin", púra greiður á hesum øki. Vit í Miðflokkinum hava sett eina greiða dagsskrá, hvussu vit skula vinna Føroyum Tjóðarfrælsi. Í samstarv á jøvnum føti við onnur lond.

Miðflokkurin vil seta á dagsskránna.

- Eina fíggjarligauppgerð við danir viðvíkjandi NATO, handli, yvirflúgving v. m.
- Sjálvandi í framtíðarsamstarvi við aðrar tjóðir (lond) á jøvnum føti.
- Avgerandi er at hetta er við trygd á Gud, heldur enn við áliti á aðrar tjóðir (lond) ella felagskapir (m. a. EU/ES).
- Um nakrar stórvegis broytingar skulu gerast í ríkisfelagsskapinum og blokkinum, SKAL hetta út til eina fólkaatkvøðu. o.s.v. (Vit vilja at fólkið skal verða við).

Fólkatkvøðan var jú tað, vit allir Føroyingar vóru so dyggiliga snýttir fyri av undanfarnu samgongu, sum hevði lovað okkum eina fólkaatkvøðu, men síðan avlýstu hana. Hetta til stórt spell fyri fólkið. Ístaðin valdu teir at skerja blokkin við sløkum 400 milliónum. Men tá talaði MIÐFLOKKURIN at og atkvøddi í móti hesum uppskoti, "men tásitandi samgonga vildi tað ørvísi, uttan at hugsa um fylgjurnar av hesum". (MIÐFLOKKURIN sat í andstøðu tá hetta fór fram).

So um tú ynskir at haldast skal fram við einari sterkari TJÓÐARFRÆLSISLEIÐ uttan at valferðin skal skerjast, og bygt á tann Kristna grundvøllin, so stuðla Miflokkinum á valinum 20 jan. 2004.

Standið saman um Suðuroynna

Jaspur Vang
valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Vit einum fallandi fólkatali og einum í løtuni vaksandi arbeiðsloysi í Suðuroynni og øðrum útjaðaraøkjum við, mugu vit ásanna, at álvarslig átøk eru neyðug fyri at venda gongdini. Vit, sum búleikast í hesum økjum kunnu og skulu so sanniliga vera við til at venda gongdini - og tað ber til.

Uttan mun til, hvussu politisku flokkarnir og vit valevni nú undan valstríðnum royna at tekkjast veljarunum við reypi og brigsli um tað, sum fari er - og ikki kemur aftur - so eri eg av teirri sannføring, at vit valevni, tá til stykkis kemur, øll ynskja at tæna landi okkara, oyggj okkara og veljarunum sum best.

Ongin iva er um, at øll valevni í Suðuroynni hørvdu tikið - og taka undir við, at undirstøðukervið í oynni verður dagført, t.v.s. at nýggjur Smyril og tilhoyrandi samferðsluhavn verða bygd, at djúphavn verður bygd, at bergholini millum Øravík og Hov og millum Øravík og Fámjin verða framd í verki og at vegasamband og berghol til Hvalbiar og Sandvíkar verða dagført. Sjálvandi eigur eisini at verða farið undir fyrireikingar - og gerð av føstum Sandoyar- og Suðuroyar- sambandi. Tað skuldi ikki veri neyðugt at brigslast, klandrast og keglast um tílíkar sjálvfylgjur. Talan er í veruleikanum um dagføringar, sum eru framdar alla aðrastaðni í landinum.

Heldur ikki er nøkur ósemja um, at tað er neyðugt, at Suðuroy og onnur verulig újaðaraøki umvegis miðspjaðing fáa sín rættvísa lut í tí miðsavnaða almenna virksseminum. Hettar soleiðis, at okkara útbúni ungdómur kann koma aftur, har hann vil vera og har hann við røttum hoyrir til.

Samanhald og samstarv er - og hevur altíð verið - lyklaorð, tá talan er um eina og hvørja menning. Tí er tað nú - meira enn nakrantíð - neyðugt, at verulig stig verða tikin á hesari leið. Eisini mugu vit ásanna, at teir trupuleikar, sum útjaðaraøkini - og harvið føroyska samfelagið hava at dragast við, ikki verða loystir eftir einum degi og at tað ikki finnast nakrar lættar - og skjótar loysnir.

Sum skjótast eiga lunnar tí at verða lagdir undir samstarv og harvið samanhald tvørtur um kommunumørk, tvørpolitiskt og tvørfakliga. Sundurlyndi og persónligar politiskar profileringar mugu hoyra fortíðini til. Vinnuvirkir, kommunurnar, ítróttin, mentan v.m. mugu samstarva sínámill- um soleiðis, at felags áhugamál verða samansjóða, undirbygd og framførd av landspolitikarunum.

Talan kann t.d. verða um at skipa økisráð ella økisáhugabólkar, sum vit kenna tað frá londunum uttan um okkum. Tann serkunnleiki, eitt nú granskingardeplarnir í Suðuroy og Norðoyggjum hava, kundi uttan iva komi okkum til góðar.

Landspolitiskt eigur at verða arbeitt fyri, at eitt nú neyv hagtøl og samfelagsbúskaparligar lýsingar leypandi verða gjørdar. Høvdu vit hesi hagtøl og lýsingar, høvdu landspolitikararnir um alt landið verið noyddir at sað í eygguni, at føroyska samfelagið er ein samanhangandi eind og at lands- politiskar og umsitingarligar avgerðir eiga at verða tiknar út frá hesum veruleika. Á henda hátt hevði eisini í størri mun verið møguligt at mett um politisku - og umsitingarligu avgerðirnar.

Tað finnast ongar lættar og skjótar loysnir. Talan er nevnilig um eina leypandi samfelagsgongd, sum vit eiga at verða før fyri at stýra betur enn higartil.

Lat okkum tí við samanhaldi og samstarvi standa saman um Suðuroynna.

Útoyggjar aftur í fokus

Tummas Frank Joensen
valevni Javnaðarfloksins í Sandoyar valdømi

Javnaðarflokkurin vil, at útoyggjar nú skulu fáa síni vallyfti framd, sum útoyggjafelagið leggur upp til. Hettar kann gera tað livandi aftur, og fólk flyta til aftur oyggjar og bygdir, sum nú bløða út.

Oljugoymslur skulu gerast, so at útoyggjafólk aftur kunnu gleðast um sín heimstað, sum tey máttu fara frá, av tí at eingin helt tey lyfti, sum vóru givin. Møguleikar eru fleiri, bert at seta hesar í verk. Her mugu vit ikki fella í fátt, men møta framtíðini við góðum treysti.

Útróðr er ein natúrlig tilfeingiskelda, eins og fuglur, seyður og neyt. Bjargastuðulin sum var á figgjarlógini skal koma aftur, hettar kann eisini tengjast saman við ferðavinnu.

Útoyggjafólk, farið á val, setið ein sterkan Javnaðarflokk á ting 20. januar.

VALGREINAR

Orkuveitingar

Andrea Eldevig
valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy

Samfelag okkara tørvar orku av ymsum slag, og er elorka ein týðandi partur av okkara orkutørvi.

Eftir verandi skipan, er einasti orkuveitari SEV, tó eru aðrirorkuveitara, tó í so lítlan mun, at tað enn ikki ger mun.

SEV hevur nú í hálva øld verið framleiðari av elorkuni, og hava teir einarætt til alla vatnorku, sum er høvuðskeldan til elorkuframleiðsluna, eitt monopol, sum forðar øðrum at nýta vatn til aðrar orkukeldir.

Útbyggingin av SEV hevur verið ógvuliga stór og kostnaðarmikil, og kann sigast, at SEV ikki er ein felagsskapur, sum hevur víst sinni til at leggja um til aðrar orkuveitingar til elorkuna, her verður hugsað um vindorku, streymorku v.m.

Seinasta átakið, SEV hevur tikið støðu til, er at taka enn meir av vatni úr áum okkara, tann sokallaða Eiði 2 ætlanin, og er her óhugnaligur framferðarháttur framdur, sum skelkar ikki fá, og serliga fólk á leiðini, har vatnið verður leitt úr økinum.

Í hesum sambandi verður farið undir útbyggingina, hóast røddir harðliga átala hesa ætlan, og millum røddirnar eru væl útbúgvin fólk, ið staðiligamæla frá, áðrenn ein møgulig áriniskanning verður gjørd, ið kann siga okkum, hvørji árin henda ætlan kemur at gera.

Í mínum hugaheima er hetta ætlan, ið ikki lítið minnir um spæl við náttúruni, har ætlanin verður framd, og verður árinið at náttúran týnist, so er onki at gera, tí ætlanin er framd og yppað øksl.

Haldið hetta verða eina váðaliga ger, ikki at gera áriniskanningar áðrenn farið verður undir ætlanina, tí í dag eru fleiri møguleikar uppi og venda, har keldur til elorkuframleiðslu eru á gáttini, sum ávirka í minni mun.

Tjóðveldisflokkurin eigur at arbeiða fyri øðrum møguleikum enn at Eiði 2 ætlanin verða framd, og her verður hugsað um vindorku, streymorku og ikki gloyma alduorku, ið er á gáttini at veraða roynd her á landi, og sum vísir seg ikki at hava árin á náttúruna.

Vit vilja lata okkara umhvørvið, náttúru fáa so lítlar umhvørvisskaðar sum møguligt, og tí er skylda okkara at varveita náttúruna og lata hana frá okkum í standi vit fingu frá okkara forfedrum.

Gott val.

Miðflokkurin sigur nei til alt!

Álvur Kirke
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Hinir flokkarnir siga, at Miðflokkurin sigur nei til alt!

Teir siga, at Miðflokkurin sigur nei til samkynt paralag.

Teir siga, at Miðflokkurin sigur nei til fosturtøku.

Teir siga, at Miðflokkurin sigur nei til royking

Teir siga, at Miðflokkurin sigur nei til rúsevni o.s.fr.

Men, er tað so ?

Nei, sannleikin er, at hetta verður vent á høvdið!

Miðflokkurin sigur ja til hjúnarbandið, sum er hin náttúrligi og besti mátin at liva saman.

Miðflokkurin sigur ja til lívið, ja til at øll eiga rættin til lívið, - eisini tað ófødda barnið!

Miðflokkurin sigur ja til eitt roykfrítt umhvørvi, - tí tað er gott fyri heilsuna.

Miðflokkurin sigur ja til eitt rúsfrítt lív, - tí tað er eitt betri lív.

Tað undrar okkum, at føroyskir politikarar eru so skjótir at taka útlendska siðvenju til sín.

Føroyingar hava í øldir havt virðing fyri hjúnabandinum.

Tað, at tveir menn ella tvær kvinnur liva saman, kynsliga, er ikki føroysk siðvenja.

Miðflokkurin vil verja góða føroyska siðvenju og góða føroyska mentan.

Vel tí Miðflokkin, lista H!

Latið hjarta velja hvar tit seta tykkara kross

Joen Petur Petersen
valevni Sambandsfloksins í Sandoyarsýsly

Nú stendur so val aftur fyri durum, valevnini hava ferðast bygd úr bygd at bjóða seg fram, til at stýra hesum landi, øll sigta seg verða tey bestu til at stýra.

Vit vilja eisini bjóða okkum fram, til at verða við at mynda tann politikk, sum rekast skal næsta valskeið, vit lata 4 valevni stilla upp her í økinum og vóna at Sandoyingar seta sín kross fyri eitt av teim, ella fyri Sambandsflokkin, tá velja tit tað trygga.

Her í oynni, hevur so veljarin, enn bara brúkt 3 flokkar at umboða seg á tingi, haldi sjálvur at vit skuldu fari at roynt nakað annað hesaferð, lat okkum fáa ein sambandsmann/kvinnu á ting fyri Sandoynna, tá skal pípan nokkur fáa eitt annað ljóð.

So vilja tit spyrja, hvat kunnu vit bjóða tykkum, sum hinir flokkarnir ikki bjóða og hava bjóða tykkum, jú góðu veljarar, vit vilja við hond og fót varðveita blokkin, hann eiga vit sjálvsagt, tí vit eru ein partur av ríkinum, so tað er ein sjálvfylgja at vit taka ímóti blokkinum, vit eiga hann jú, vit fáa einki frá Dønum.

Vit vilja verða við til at menna tað føroyska samfelagi, so tað stendur mát við øll nútíðar samfeløg, baði innan fiskivinnu og tað tøkniliga, vit vilja skapa karmar so at tað er rúmsátt hjá vinnuni at arbeiða undir, slag orðið má tó verða, at vinnan má verða lønandi. Hendir tað at onkur vinnugrein hevur lindi til at snáva á, so mugu vit um tað er ráðiligt hjálpa til fyri at reisa hana aftur, um tað so skal eita ein fyribilsstuðul, tað skal nokk bera ávøkstur seinri.

Vit vilja verða við til at betra um samferðsluna við miðstaðarøki, við at tilrættaleggja eitt fast samband undir Skopunarfjørð og føra tað út í verkið.

Ungdómin vilja vit so vítt gjørligt, hava til at støðast í oynni, tað gera vit best við at samferðslan er góð við miðstaðarøki, har næstan allir útbúgvingarmøguleikarnir eru.

Vit vilja verða við til at betra um lækniaviðurskiftini, vit vilja gera tey meira álítandi enn tey eru nú, sum tað hevur verði og er, er ikki nøktandi fyri borgaran í oynni, tað er sera sera ótrygt.

Vit vilja verða við til at stuðla, so at ein lista- og ítróttarháskúli verður settur á stovn her í oynni, saman við kommununum.

Vit vilja eisini arbeiða fyri at vegakervið til eystur- og vestur- og Dalsberg og Sandslið, tað eru sera vandamikil strekkir hjá ferðsluni at koyra um.

Góðu Sandoyingar, lat okkum standa saman, um at fáa ein sterkan sambandsflokk á ting, lat okkum skriva søgu á hesum sinni, vit kunnu fáa sambandsmannin á ting.

Vel lista B tín trygd fyri framtíðina

Tørvur er á útlendskum kapitali

William Max Hansen
Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy

Sjónarmið ímóti útlendskari ávirkan

Sjónarmið, sum førd verða fram, tá íð tosað verður um einskiljing, kunnu verða :

1) Um fordingar ikki verða settar ímóti útlendskum ílogum, fara útlendingar at fáa ávirkandi atkvøðurætt í føroyskum fyritøkum.
2) Útlendsku íloguirnar koma frá stórum fyritøkum (t.d. íslendskum, norskum og donskum) sum fáast við virksemi innan somu vinnugrein sum føroyska fyritøkan, teir gera íloguir í. Hetta kann hava við sær, at rávøra ikki verður virðisøkt í Føroyum, men aðrastaðir.
3) Føroyingar kunnu einki gera við henda hugsaða trupuleika, tí útlendingar hava fingið ræði á fyritøkuni.

Ótryggleikakenslan

Føroyingar missa ræði á føroyskum fyritøkum.

Fyrst verður fram, at tjóðin hevur áhugamál í, at tey, sum eiga fyritøkurnar í landinum, eru íbúgvar og ikki útlendingar. Her er talan um ótryggleikakenslur hjá borgaranum, sum politiski mynduleikin ikki kann gera stórt við, annað enn at hjálpa borgaranum við at fáa til vega haldgóða vitan um hvat kapitalinnspræningar sum møguliga verða at fremja; heruppíi eisini hvørjar treytir myndugleikarnir áseta um virksemi og at varðveita arbeiðsplóss í hesum sambandi.

Veruligu áhugamálini

Tankarnir, sum her verða settir fram, nýtast ikki at vera á skeivari leið, men ein trupuleiki við hesum útsøgnum er, at farið verður ov lætt um nágreining av, hvørji veruligu áhugamálini eru, føroyingar hava, hvat ræðisrætti yvir vinnuni viðvíkur. Kann vera, at nakrir føroyskir vinnulívsmenn ikki longur sita ovast í leiðslu fyri føroyska fyritøku, eftir at útlendskur kapitalur hevur keypt seg inn í fyritøkuna.Um hetta er gott ella ringt, velst um eyga sum sær.

Ræðisrætturin okkara

Tað, sum hevur týðning fyri allar føroyingar, er, at ræðisrætturin hjá politisku skipanini til at skipa karmarnar fyri vinnuni ikki minkar ella svekkast. Slíkt má fyri alt í verðini ikki verað úrslitið av útlendskari íloglu í føroyska fyritøku.

Vandamál

Hinvegin kan vera talan um samfelagsligt vandamál, um útlendski íleggjarin hevur ætlanir um "figgindaliga" yvirtøku, sum m.a. hevur til endamáls at leggja virksemið niður og flyta tað til útlond, ella ætlar at vinna sær monopolstøðu ella at tryggja sær atgongd til "rávøru". Her er tó talan um hugsaðan samfelagstrupuleika, sum bæði útlendsk fyritøka eins væl og aðrar føroyskar fyritøkur kunnu elva til, men sum politiska skipanin hevur vald at fyribyrgja.

Lóggávuvaldið kann tryggja

Amboð hjá landstýri og løgtingi til at tryggja brúkara- og onnur breið samfelagslig áhugamál í hesum viðfangi eru t.d. kappingarlóggávan, vinnulóggávan og skattalóggávan. Kolvetnislógin og kolvetnisskattalógin eru í hesum viðfangi talandi dømi um, hvussu lóggávuvald kann tryggja breið føroysk áhugamál og skapa karmar fyri, hvussu stór útlendsk kapitaláhugamál sleppa at virka í føroyska samfelagnum.

PS: Sagt er um mann, at hann ræddist so illa landnyrðing á Kappanum, at hann legði onki í, um hann gekk burtur í útsynningi.